## Ein nýggj byrjan!

Vit bjóða okkum fram at stýra okkara kommunu. Framtíðarlistin er ein listi við fólki, ið vilja menning, mentan og trivnað. Ein listi við visjónum um eina kommunu, sum er sosialt, búskaparliga og umhvørvisliga burðardygg. Vit miða eftir, at vit, eisini um 50 ár, hava eina fjølbroytta kommunu, har øll kenna seg heima og verða hoyrd.

## Vælferð

At vera ein sosialt burðardygg kommuna merkir, at trivnaðurin er góður, at fólkið hevur tað gott, og at grundleggjandi tørvurin er nøktaður hjá ungum sum eldri. Grundarlagið undir hesum eru góð bústaðarviðurskifti, nøktandi vinnuøki, arbeiðspláss og eitt ríkt mentanarlív.

## Ábyrgd

At vera búskaparliga burðardygg merkir, at vit føra ein skynsaman og langtíðar fíggjar- og vakstrarpolitikk. Býráðslimir skulu umsita felagsognir í kommununi skilagott og býta skatta inntøkurnar hjá okkum øllum út á rakstur og íløgur.

## Vøkstur

Fyri at mennast og vaksa er neyðugt at økja um inntøkurnar. Hetta skal gerast við at draga fleiri tilflytarar til kommununa og at økja um vinnumøguleikarnar.

## Atlit

Atlit má takast til umhvørvið, so vit øll kunnu liva og virka her. Vit skulu hugsa um at fáa eina kommunu, sum er burðardygg langt inn í framtíðina. Hetta skal vera grundfest í langtíðarætlanum.


Kristina Mouritsen


Elisabeth Haraldsen


Hans Bogi Ellefsen


Jens Gaardlykke


Sølvi Simonarson


Ásla Leila Johansen


Oddmar Ravnsfjall


Jóhan Á Mýrini


Jónhard Selfoss


Sólfríð Fjallsbak


Lennard J. Myllhamar


Jóan Magnus Magnusson


Jóhannus Hansen


Finnur Joen-Jacobsen


Herborg H. Gaardlykke

# FRAMTÍÐARLISTIN

ein nýggj byrjan

## Børn og ung
Vit eiga at skapa rúm fyri fjøltáttaðum frítíðarvirksemi og hava fleiri handalig og kreativ tilboð. Soleiðis fáa vit betri frítíðar- og mentanarútboð til tey ungu. Vit vilja betra um karmarnar í ungdómshúsinum.

## Virkin sum longst
Vit vilja í tøttum samstarvi við pensionista-felagið og okkara eldru slóða fyri, at eldri borgarar hava møguleika at vera virknir sum longst.

## Bústaðarviðurskifti
Grundstykkir skulu altíð vera tøk. Langtíðar-ætlanir skulu gerast til framtíðar bústaðar-byggingar við fjølbroyttum bústaðar-møguleikum. Asfalteraðir vegir, gøtuljós og gonguteigar skal alt vera liðugt, áðrenn bygt verður á økinum. Vit eiga í størstan mun at byggja eftir lendinum. Somuleiðis vilja vit arbeiða fyri at fáa fleiri íbúðir í kommununa. Her er talan um bæði luta-, lestrar- og eldra-íbúðir.

## Ferðsluviðurskifti
Ferðslutrygdin skal hava hægstu raðfesting. Bygdirnar eru høvðusferðsluæðrin út í heim, men hetta skal ikki ganga út yvir trygd og trivnað. Í tøttum samstarvi við Landsverk skal kommunan gera av, hvussu ferðslan koyrir gjøgum bygdirnar. Øll íbúðarøkini í kommununi skulu hava tryggar farleiðir og góð parkeringsviðurskifti.

## Skúli
Langtíðarætlan skal gerast fyri skúlaøkið á Giljanesi. Hendan ætlan eigur at innihalda skúla, forskúla, frítíðarskúla, matarskipan, ítróttarvirksemi og svimjihøll. Verandi út-byggingarætlan fyri skúlan á Giljanesi skal gerast liðug sum skjótast, og vit miða eftir at byrja 3. byggistig av skúlanum í valskeiðnum.

## Ítróttur, mentan og íverksetan
“Kreativa húsið”skal stovnsetast. Her hugsa vit eina samskipanareind, sum tekur sær av ymisku hølunum, umframt frítíðar- og mentanartilboðum, og skipar fyri savnandi tiltøkum. Somuleiðs skal hetta virka sum ein gróðrarbotnur fyri íverksetan. Eitt hús við lágari gátt, og hugskot sum flúgva høgt. Kommunan skal tryggja góðar umstøður so tey mongu sjálvbodnu fáa bestu karmar at virka undir.

## Vinnulív
Vinnan skal altíð hava bestu umstøður. Havnaøkið skal dagførast. Meira pláss skal gerast til vinnulívið á havnaøkinum, og vinnuøkið norðuri á Tjørn verður gjørt klárt. Kommunan skal eisini vera aktivur sam-starvspartnari hjá vinnuni.

## Ferðavinna og frítíð
Ferðavinnan skal takast í álvara og eigur at verða raðfest hægri. Ferðavinnan er tann vinnan, ið veksur skjótast í heiminum, og -um rætt verður borið at, eisini tann vinnan, ið kann skapa mest virksemi til frama fyri trivnaðin og mentanarlívið.

Vit vilja bøta um traðarvegir, gøtur, almenn wc, skelting og annað, sum kann lætta um hjá vinnuni. Arbeiðast skal við at útvega øki bæði til summarhús og neystaøki.

## Umhvørvið
Átøk skulu gerast, so kommunan verður umhvørvisvinarligari. Vit skulu vera sjálv-bjargnari við egnum tilfeingi, tá tað kemur til grøna økið. Tað skal vera léttari at sleppa av við burturkast. Møguleikarnir at skilja burtur-kastið skulu betrast, so mest møguligt kann fara til endurnýtslu. Ætlanin er, at kommun-alir bygningar fáa umhvørvisvinarliga grøna orku. Vit skulu hava eina ruddiligari kommunu sum veitir borgarunum umstøður at goyma størri lutir trygt. Nógv fleiri trøð og runnar skulu gróðursetast fyri at fríðka og fjálga um.

## Fíggjarviðurskifti
Við at føra skynsaman fíggjarpolitikk vilja vit støðugt arbeiða við at lækka skattin og hækka barnafrádráttin. Hetta skal gerast við at umraðfesta, soleiðis at vit fáa meira fyri pengarnar.

## Samstarv
Samstundis sum samanhaldið í øllum trimum bygdunum í kommununi skal styrkjast, skal samstarvið við granna-kommunur eisini styrkjast og mennast. Soleiðis vera vit ein sterkari eind. Vit vilja arbeiða fyri, at okkara oyggj er við í kappingini, og at okkara rødd verður hoyrd í kommunufelagnum.